ÍTRÓTTARBLAÐIÐ
Sosialurin 16. juli 2009

# Sekundini gjørdu munin

**Statoil Kring Føroyar fekk eina sera spennandi byrjan við prologinum í Klaksvík í gjárkvøldið, tá bara 10 sekund vóru millum tríggjar teir fremstu, og bara fýra sekund millum tey bæði fremstu liðini. Í dag sleppa liðini veruliga at standa sína roynd**

SÚKKLING
*Hilmar Jan Hansen*
*einslistir@kallnet.fo*

Sum so ofta fyrr, byrjaði Statoil Kring Føroyar við prologi í Klaksvík, og enn eina ferð var talan um ein einkultstart á átta kilometra longum teini, ið gekk frá Statoilstøðini norður til Ánirnar og aftur. Sjáldan vinnur nakar sær avgerandi fyrimun á so stuttum teini, men hinvegin hevur tað sjáldan verið so javnt, sum tað var tað í gjárkvøldið.

Danski A-súkklarin, Troels Toftager Nielsen, vann prologin í Klaksvík við tíðini 10 minuttir og 22 sekund, og harvið vísti sína styrki í kappingini. Serliga síðsta pettið av teininum hevði hann góða ferð á og vann sær avgerandi sekundini. Tá avtornaði, var hann átta sekund framman fyri nummar tey, sum var fremsti føroyingurin, Torkil Veyhe. Hann var hinvegin bara tvey sekund framman fyri Hafsteinn Ægir Geirsson úr Íslandi, sum hevur vunnið kappingina síðstu árini.

Hjá kvinnunum vann Súsanna Skylv Sørensen við tíðini 12 minuttir og 25, og góðar tveir minuttir aftan fyri hana kom Marin Ennistein Heinesen á mál. Í ungdómskappingini kom Jóanis Albert Nielsen á mál við tíðini 15 minuttir og 36 sekund. Í kappingini hjá veteranunum, teimum oman fyri 45 ára aldur, var íslendingurin Gunnlaugur Jonasson, fremstur við tíðini 10 minuttir og 44 sekund, og síðani komu føroyingarnir, Andrass Joensen og Evald Rasmussen, ávikavist ein og góðar tveir minuttir aftanfyri.




**Teir níggju súkklararnir á trimum teimum fremstu liðunum – HFR Team, Team GTG og Team Hjólamenn – royndu at kroysta seg upp á sigurspallin eftir prologin í Klaksvík í gjárkvøldið**
Mynd: Bergur Ingemarsson Johansen

### Eisini liðkapping

Fyri fyrstu ferð er Statoil Kring Føroyar skipað sum liðkapping, og tí snýr tað seg ikki bara um, hvussu væl tað gongst teimum einstøku, tí nú ræður eisini um at fáa hinar á liðnum við sær. Tí kann roknast við nógv meira taktikki hesa ferð, enn vit hava sæð undanfarin ár í Føroya harðastu ítróttarkapping.

Skipanin er tann sama, sum vit kenna frá landavegssúkkling í oyggjaleikahøpi, at tríggir eru á hvørjum liði, og hvønn dag eru tað úrslitini hjá teimum báðum fremstu, ið telja, meðan úrslitið hjá tí triðja fellur burtur í liðkappingini. Hinvegin skulu allir tríggir gjøgnumføra, fyri at liðúrslitið skal telja við.

Av tí at Troels Toftager Nielsen súkklar sum einstaklingur og ikki er við á nøkrum liði, var tað millum teir næstu súkklararnar aftan fyri hann, at tann stóra kappingin var í so máta. Og so fáa vit at síggja, um liðini megna at fáa sínar bestu fram um danska A-súkklaran, tá avtornar.

### Fýra sekund á muni

Ikki kann sigast annað, enn at spenningurin í liðkappingini er stórur frá fyrstu løtu, tí har eru bara fýra sekund á muni millum íslendska liðið HFR Team og føroyska Team GTG, sum síggja út til at verða tey, ið fara at kappast harðast har frammi í liðkappingini, kanska við íslendska Team Hjólamenn aftur at sær.

Frontfigurarnir á teimum báðum fremstu liðunum eru ávikavist Hafsteinn Ægir Geirsson, ið hevur vunnið Statoil Kring Føroyar síðstu fýra árini, og Torkil Veyhe, sum bæði í fjør og í fyrraárið bjóðaði íslendinginum sera væl av.

Nú 115 kilometra langi teinurin í Eysturoynni er á skránni í dag, fæst so at síggja, hvussu væl teir fáa lið síni at arbeiða og hvussu taktiska kappingin verður.

Teinurin í dag byrjar við Statoilstøðina í Gundadali, og síðani verður súkklað umvegis Kaldbakstunnilin og Norðskálatunnilin til Selatraðar og síðani til Runavíkar, har vent verður í rundkoyringini og súkklað á mál við Statoilstøðina í Saltangará. Væntandi kemur vinnarin á mál nakað eftir klokkan 17 – men tað velst alt um taktikk, veðurlíkindi og alt møguligt annað…

## Veruliga góðir

**Prologurin í Klaksvík í gjárkvøldið staðfesti, at teir báðir súkklararnir, sum hava verið fremstir í Statoil Kring Føroyar síðstu tvey árini, veruliga eru góðir**

SÚKKLING
*Hilmar Jan Hansen*
*einslistir@kallnet.fo*

Hafsteinn Ægir Geirsson hevur verið marran hjá føroysku súkklarunum síðstu fýra árini. Fyrst mátti Gunnar Dahl-Olsen livað við at vera beint aftan fyri hann tvær ferðir, og síðani hevur tann luturin verið hjá Torkili Veyhe síðstu tvey árini.

Men skulu vit taka úrslitið av prologinum í Klaksvík fyri fult, hevur kappingin fingið eina nýggja marru í nýggja danska súkklaranum, Troels Toftager Nielsen, sum er við fyri fyrstu ferð. Hann er A-súkklari og sostatt millum teir bestu, sum kappast í Danmark. Og hóast munurin til nummar tvey bara var átta sekund, var hann sannførandi í einkultstartinum í Klaksvík.

Um hugt verður burtur frá vandanum fyri, at Troels fer at gera bæði Torkili og Hafsteinni lívið súrt hesa ferð, hóast hann er einstaklingur ímóti tveimum liðum, so var avrikið hjá teimum í gjárkvøldið samstundis ein staðfesting av, at teir veruliga eru góðir. Tað, at teir megna at geva einum donskum A-súkklara kapping til strikuna, sigur ikki so lítið!

Statoil Kring Føroyar er á ongan hátt ein lættisoppakapping, men snøgt sagt Føroya harðasta ítróttarkapping, tí súkklararnir náðileyst skulu stríða seg ígjøgnum tilsamans 332 kilometrar í fimm dagar. Samlaði teinurin svarar til ein tíggjundapart av Tour de France, sum gongur yvir 23 dagar, so her krevst nógv orka og stórt yvirskot, bara fyri at gjøgnumføra.